LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Almanna- og mentamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Tórshavn, tann 8. juni 2023
J.Nr.: LUM-16- 21/16275-4
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr: 23/01350.

Hoyringssvar frá Løgtingsins umboðsmanni í sambandi við uppskot til Løgtingslóg um Brekumboð

Við skrivi dagfest 10. maj 2023 hevur Almanna- og mentamálaráðið sent uppskot til løgtingslóg um brekumboð til hoyringar.

Løgtingsins umboðsmaður ger vanliga ikki viðmerkingar til lógaruppskot, uttan so at uppskotið beinleiðis viðvíkur virksemi hansara. Í hesum føri er ávíst markamót millum ætlaða brekumboðið og virksemi hjá Løgtingsins umboðsmanni, eins og virksemi umboðsmansins verður umrøtt í viðmerkingunum.

Viðmerkingarnar í hesum skrivi eru tí einans viðvíkjandi tí partinum av lógaruppskotinum, sum viðvíkur virksemi umboðsmansins ella hevur markamót móti virksemi umboðsmansins.

Eg haldi, at viðmerkingarnar um virksemi og heimildir umboðsmansins geva ikki eina rætta mynd.

Heimildir og virksemi umboðsmansins eru ásett í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020. Um Løgtingið ynskir at nágreina setning umboðsmansins, er best at hetta verður gjørt í lógini um Løgtingsins umboðsmann.

Óheftni og heimildir umboðsmansins

Í almennu viðmerkingunum undir punkt 1.1, Orsøkir til uppskotið, stendur, at Brekumboðið og Løgtingsins umboðsmaður eru í virksemi sínum óheftir av hvørjum øðrum.

Óheftni hjá Løgtingsins umboðsmanni av Føroya løgtingi er ásett í § 3 í umboðsmanslógini. Sambært § 4, stk. 1 í umboðsmanslógini hevur umboðsmaðurin eftirlit við allari fyrisiting heimastýrisins, herundir sum meginregla eisini einum brekumboði, sum verður sett á stovn undir landsstýrismanninum. Um broytingar ella nágreiningar skulu gerast í heimildum umboðsmansins eiga hesar at vera gjørdar í umboðsmanslógini.

Viðvíkjandi heitinum kærumyndugleiki

Tað er ikki rætt, tá ið Løgtingsins umboðsmaður í almennu viðmerkingunum verður nevndur ein kærumyndugleiki. Løgtingsins umboðsmaður er ein klagu- og eftirlitsmyndugleiki.

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við allari fyrisiting heimastýrisins, t.v.s. bæði lands,- og kommunalu- og interkommunalu myndugleikunum og ikki bert ávísum fyrisitingarøki, sum vanligir kærumyndugleikar hava.

Virksemið hjá fyrisitingarligu kærumyndugleikunum kemur eisini undir eftirlitið hjá umboðsmanninum.

Í mótsetning til vanligar kærumyndugleikar ger umboðsmaðurin sjálvur av, hvørji mál hann tekur til viðgerðar, sí umboðsmanslógin § 6, stk. 4.

Klagur um eitt nú mismun vegna brek kunnu latast til Løgtingsins umboðsmann, sum hevur eftirlit við allari fyrisiting heimastýrisins, men umboðsmaðurin er ikki ein kærumyndugleiki.

Viðvikjandi eftirliti umboðsmansins

Í almennu viðmerkingunum, undir punkt 1.2, Galdandi lóggáva, stendur, at Løgtingsins umboðsmaður viðger klagur og fremur bert eftirlit, um viðurskifti, sum eru endaliga viðgjørd fyrisitingarliga.

Hetta er ikki rætt.

Heimildir umboðsmansins til at fremja eftirlit og kanningar eru ásettar í lógini um Løgtingsins umboðsmann.

Meginreglan um, at viðurskifti skulu vera endaliga viðgjørd fyrisitingarliga, áðrenn Løgtingsins umboðsmaður viðger tey, er at finna í § 6, stk. 3 í umboðsmanslógini, sum er soljóðandi:

> "Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum. Freistin, ið er nevnd í 2. stk., skal í slíkum førum roknast frá tí degi, hægri myndugleikin tekur avgerð sína."

Henda áseting er galdandi fyri klagu um avgerðir, har kærumøguleiki er. Ásetingin er ikki galdandi fyri eftirlitsvitjanir. Umboðsmaðurin leggur seg tó altíð eftir, at avvarðandi myndugleiki fær høvið at taka støðu til viðurskifti, áðrenn umboðsmaðurin fer inn í tey.

Sambært § 4, stk. 1 og § 5 í umboðsmanslógini fevnir virksemi umboðsmansins um alla almennu fyrisitingina, og umboðsmaðurin kann sambært § 6 stk. 7 kanna allar stovnar, myndugleikar og tænastustøð, sum eru fevnd av virkisøkinum hjá umboðsmanninum.

Sambært § 8, stk. 3 hevur umboðsmaðurin rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

Eftir at hava viðgjørt ítøkilig mál ella hava verið á eftirlitsvitjan ger umboðsmaðurin vart við síni sjónarmið umvegis niðurstøður og frágreiðingar.

Eftirlitið í sambandi við vitjanir á eitt nú bústovnum, er ikki avmarkað til viðurskifti, sum eru endaliga viðgjørd fyrisitingarliga. Talan er hinvegin um eitt rættiliga breitt eftirlit, har tosað verður við leiðslu, starvsfólk og búfólk, og har eisini verður hugt at fysisku umstøðunum. Í sambandi við eftirlitsvitjanir hevur umboðsmaðurin vanliga eisini hugt at eitt nú atkomuviðurskiftum.

Sum dømi um eftirlitsvitjanir av hesum slag kann nevnast frágreiðing frá eftirlitsvitjan á sambýlunum hjá Almannaverkinum, Eiðisgarður í Vági, á Húsadalsvegi í Sørvági og á Traðarvegi í Sandavági (sambýlir fyri fólk við sálarsjúku) í 2022.

Viðvíkjandi eftirliti á brekøkinum

Í § 3, stk. 1, nr. 5 í lógaruppskotinum stendur, at Brekumboðið skal gera frágreiðingar og kanningar um viðurskifti hjá fólki, ið bera brek. Í serligu viðmerkingunum til hesa grein verður sagt, at Brekumboðið kann biðja um at sleppa at vitja stovnar og støð, har fólk, ið bera brek er, ella við at biðja almennar myndugleikar um at lýsa teirra politisku avgerðir og fyrisitingarligu siðvenjur á teimum økjum, sum hoyra til myndugleikan.

Hetta tykist í ávísan mun at falla saman við virksemi umboðsmansins økinum.

Í sambandi við eftirlitsvitjanir og klagumál kann umboðsmaðurin eisini hyggja at atkomu og mismuni vegna brek, men uttan at hesin partur verður tikin framum ella serliga raðfestur framum onnur øki í arbeiðnum.

Vinarliga

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður